UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Dagfesting: 03.03.2026
Málsnr.: 26/05916-2

Svar upp á fyrispurning nr. 52-099/2025 sambært § 52 a í tingskipanini til Sirið Stenberg, landsstýriskvinnu, frá Jacob Vestergaard, løgtingsmanni, um ognartøku av almennari ogn/festijørð eftir byggi- og býarskipanarlógini

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Hava kommunur heimild at ognartaka almenna ogn/festijørð eftir løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir?

Svar:

Kommunur hava sambært § 12, stk. 1 í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir heimild til at taka privata ogn móti endurgjaldi, tá ognartøkan er neyðug til at fremja tey í góðkendari byggisamtykt ætlaðu tiltøk.

Uttanríkis- og mentamálaráðið metir soleiðis ikki, at § 12, stk. 1 í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir gevur kommunum heimild til at ognartaka almenna ogn ella festijørð.

Uttanríkis- og mentamálaráðið, 3. mars 2026

Sirið Stenberg
landsstýriskvinna